# fóta tær í london

ráðstevna og kunningarferð



Menningarstovan skipar í samstarvi við Norðurlandahúsið og føroysku sendistovuna í London fyri spennandi tiltøkum í London 9. til 13. oktober 2006, sum serliga venda sær til skapandi fólk innan tónleik, sniðgávu og listahandverk

**Tónleikur**
Where is my deal?
· How to get attention from those with signing powers?
· What kind of deals are realistic to further an artist's career?
· How can a publishing deal at an early stage help?

John Best, manager hjá Sigur Rós, Susan Rush, stjóri í ADA Music, Sam Winwood frá Kobalt Music publishing og onnur svara tínum spurningum.

**Sniðgáva**
Small Fish in a Big Pond
· What approach to use for entering into the market?
· Where do you start creating your network?
· The purity of the primitive - can you cash in on that?

Martin Asmussen frá donsku sendistovuni og sniðgevar, keyparar og serfrøðingar í London hava orðið.

**Listahandverk**
Origin
· London Craft Fair at Somerset House
· Vitjan á framsýningini fyri listahandverk

Barbara Jones frá Craft Council greiðir frá treytunum at luttaka sum framsýnari.

Møguleiki verður at vitja fyritøkur, stovnar og handlar, sum t.d. MTV, EMAP, Harrods og British Craft Council. Skipað verður fyri PR-event - Funky Faroe Islands í The Somerset House. Barbara í Gongini, Elisa Heinesen, Guðrun & Guðrun og Jóhanna av Steinum vísa fram teirra nýggjastu kreatiónir. Eivør og Teitur spæla, meðan Faroe Seafood bjóðar okkurt leskiligt til matna.

Kostnaðurin fyri tiltakið er kr. 7.500 fyri hvønn, íroknað ferð, ferðaavgjald, ráðstevnu og atgongumerki. Kostnaður fyri Londonbúgvar er kr. 1.250. Avmarkað pláss. Tilmelding á Menningarstovuni sum skjótast og í seinasta lagi 2. oktober 2006 á trade@trade.fo.

menningarstovan · bryggjubakki 12 · postmoga 259 · 110 tórshavn · tel 35 31 00 · www.trade.fo

TEAM85



# Trygdarleiðari

**Statoil Føroyar søkir eftir kvinnu ella manni at leiða trygdararbeiði felagsins**

## Starvið

Sum trygdarleiðari stendur tú á odda fyri heilsu-, trygdar- og umhvørvisøki okkara, eisini kallað HTU. Starvsøkið fevnir um alt virksemi okkara, t.e. útkoyring, goymslur, hitatænastu, bensinstøðir, sølu og fyrisiting.

Statoilsamtakið raðfestir HTU-økið sera frammarlaga. Arbeiðið verður skipað við íblástri frá toymum, ið virka tvørtur um landamørk.

## Arbeiðsuppgávur

Dagurin sum trygdarleiðari er fjølbroyttur. Nakrar av uppgávunum eru at:

- Skipa fyri, at HTU framhaldandi er natúrligur partur av arbeiðsdegnum hjá starvsfólki okkara
- Leiða og skipa innanhýsis HTU-bólkar
- Gera innanhýsis mannagongdir
- Fylgja menningini við hagtølum
- Skipa fyri skeiðum
- Vera við í HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum

## Tínir førleikar

Tú dugir væl við fólki, ert framtøkin, arbeiðir sjálvstøðugt og skipar arbeiði títt væl. Tú hevur hegni at bera orð tíni fram, bæði skrivliga og munnliga, og enskt er eingin trupulleiki fyri teg.

Fakliga hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir. Hevur tú ikki tað, men heldur teg vera egnaðan kortini, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn, har tú greiðir frá, hví júst tú ert rætta fólkið til starvið.

## Okkara tilboð til tín

Vit bjóða tær eitt gott starv, har tú á mangan hátt skipar dagin eftir vild. Sum partur av altjóða samtaki bjóða vit tær góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning, har tú gerst partur av HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum.

Starvið verður skipað sum stápsfunktión við beinleiðis tilvísing til leiðsluna. Lønin verður sambært avtalu, og eftirlønartrygging fylgir við.

Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johan Poulsen, tekniskan leiðara, ella Niels Juel Nattestad, stjóra, á telefon 34 35 00.

## Hevur starvið tín áhuga?

Send eina umsókn í seinasta lagi 10. oktober 2006 til frnjn@Statoil.com, ella send vanligt bræv við frámerkinum "Trygdarleiðari" til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Umsókn tín verður viðgjørd í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarunum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.*

REPROZ

**STATOIL**
*– fyri viðskiftafólk okkara*